Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jenis av Rana, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Fremmand trúarsúmbol í Føroyum

Spurningar:

1. Hvørjar eru mannagongdirnar fyri staðseting av fremmandum trúarsúmbolum í Føroyum – krevjast umsóknir til slík, og um so er hvørjar og til hvønn?
2. Hvørjir møguleikar eru fyri at avmarka ella forða fyri staðseting av fremmandum trúarsúmbolum í Føroyum?
3. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at seta slíkar avmarkingar ella forðingar í verk?

Viðmerkingar
Seinastu tíðina hava tíðindi borist um ætlanir um staðseting av sonevndari mosku í Føroyum. Hesi tíðindi eru m.a. grundaði á eina almenna lýsing eftir hølum, muslimskum hølum til djúphugsan og fráboðan, og um stovnan av einum felag við sama endamáli (Center for muslimsk meditationshus).

Hesi tíðindi hava skapt rúgvusmikið kjak millum manna, har nøkur fegnast meðan mong harmast, óttast og ávara. Hesi ávara móti at opna dyr fyri einari fremmandari ideologi, sum slík hølir, sum í longdini kunnu hugsast at enda sum moska, fara at umboða.

Meðan tey, ið tala fyri, tosa um fordómar og ótolsemi, vísa tey, ið tala ímóti, á royndir úr grannalondum og øðrum londum. Har verða ávirkanir og fylgjur av slíkum deplum og moskum sagdar vera beinleiðis vandamiklar fyri vesturlendsku, á kristna boðskapin grundaðu, mentanina. Víst verður á ávirkan frá fremmandum tjóðum gjøgnum fíggjarligan stuðul til bygging og rakstur av moskum, og beinleiðis verða slíkar ákærdar fyri at skapa paralellsamfeløg, ið elva til ófrið og forða fyri tillaging (integratión).

Á Løgtingi, 5. januar 2026

Jenis av Rana